







*Mítt Egyptaland var sól, blómur og frítíð – men aftanfyri vøkru fasaduna goymdi seg eitt land, ið er mitt í eini kollvelting*

FERÐAMYNDIR: INNA TÖRNROOS

internet ber ikki til at hava bankar og sjálvtøkur opnar. Peningurin, sum var í sjálvtøkunum, bleiv skjótt uppi, og vit, sum ikki vóru nóg skjót, høvdu ongan reiðan pening – og fimm dagar vóru eftir av feriuni…

## Familjan bangin

Triðja dagin vórðu vit vakt av telefonunum. SMS frá vinum og kenningum, ið vóru bangin um okkum. Tey høvdu nevniliga sæð sjónvarpsmyndir av Tahrir-torginum, har 250.000 fólk savnaðust at mótmæla.

Danska, svenska og norska uttanríkisráðið fráráddu fólki at ferðast í Egyptalandi, og Finnland tók allar sínar borgarar heim.

Sigi eg, at hetta ikki ávirkaði okkum, lúgvi eg. Sjálvsagt vóru vit órógvað av, at øll heima vóru bangin, og at vit ikki vistu, hvat hendi í landinum.

Ferðaleiðararnir royndu at greiða frá, at hetta fór at ávirka okkum, men samstundis komu SMS-boð heimanífrá, har boðini vóru, at tjóvar herjaðu í grannabýnum.

1. februar savnaðust allir finnar á hotellinum. Bussar koyrdu tey á flogvøllin, har serlig flogfør vóru leigað at flúgva tey heim skjótast gjørligt.

Hjá okkum var ikki nógv annað at gera, enn at royna at fylgja við sum frægast og njóta feriuna, sum frægt sum tað bar til.

## Handlarnir stongdu

Um kvøldið eydnaðist mær at finna ein handil, sum tók ímóti korti. Handilsmaðurin greiddi frá, at eg var hansara seinasta viðskiftafólk, tí nú stongdi hann handilin.

Her er onki fólk eftir at selja til. Nú stongi eg og fari heim til familjuna. Vónandi kann eg lata upp aftur um ein til tveir mánaðir, segði hann.



MYNDIR: POLFOTO



*Sum mest hava yvir ein millión fólk savnast á Tahrir-torginum, at mótmæla einaveldisharran Mubarak*

Fleiri aðrir gjørdu tað sama, og dagin fyri vit fóru heim, læt ein av stóru matstovunum á hotellinum aftur.

Sum tíðin leið gjørdist greitt, at stórur partur av starvsfólkinum á hotellinum var sendur til hús. Tað gjørdist tómligari fyri hvønn dag, ið gekk, og tey 51 prosentini, sum ferðavinnan stendur fyri í egyptiska búskapinum, mundu minkað í stórum hesar dagar.

Men ikki allar tjóðir vóru líka fjálturstungnar sum tann finska. Russarar komu til hotellið sama dag sum tað leikaði harðast á í Kairo, og ein bretskur ferðaleiðari, ið eg tosaði við, segði soleiðis:

Tað er ongin orsøk til panikk. Her er róligt, og vit verða verandi.

## Síðstu skandinavar

Tá vit lendu aftur heima eftir eina viku burtur, vóru vit síðstu norðurlendingar hjá stóru ferðafeløgunum at koma heim úr Egyptalandi.

Eitt tað fyrsta, vit gjørdu, var at ringja til familju og vinir og siga at vit høvdu tað gott, og síðani kundu vit fara á internetið at lesa, hvat veruliga var farið fram, meðan vit vóru í okkara »bobblu«…

Skelkandi tíðindi um særdar og dripnar journalistar. Milliónir av fólki í mótmælisgongum og ein einaræðisharri, ið noktar at fara frá.

Sama ferðaskrivstova, sum eina viku áðrenn hevði vissað okkum um, at onki var at vera bangin fyri, avlýsti allar ferðir til Egyptalands.

Vit eru trygt heima. Men fyri handilsmannin, mennirnar í móttøkuni og øll hini vóni eg, at mótmælini ikki verða til fánýtis, og at vit næstu ferð kunnu fara aftur til eitt betri Egyptaland.